

# ÚTIGUDSTÆNASTA

Á OVARA VØLLI
Í GUNDADALI
**2. hvítusunnudag**
29. mai 2023

## 1. SÁLMUR

Nú skínur sól í dýrd og mæti
– lívsljós av Harrans náðisæti –
nú kom Guðs náð so mild og blíð
og so hin væna summartíð;
nú spáar meir enn einglareyst
í Jesu navni valaheyst.

**2.** Ta løtu, summarsólin setur,
so fróur títlingurin letur;
og alt, sum Harrin kannar sær,
fær søtan svøvn, – tí hann er nær,
fær sælan dreym um paradís
og vaknar til Guðs lov og prís.

**3.** Guðs signing yvir dustið andar
eitt heimligt lag frá fjall' til strandar,
av yndi angar undir ský
úr paradís dýrdmetan ný,
og vakurt fer í ong avstað
úr lívsins flóð eitt kelduvað.

**4.** Tað veldur andin, sum her dalar,
tað virkar andin, sum her talar
Guðs orð til troyst og sálarbót
av kærleika og sannleiks rót
í navni orðsins, sum varð hold
og fór til himmals undan mold.

**5.** Kom, syngið andans prís og æru
nú jarðarríkis mannaskari.
Úr hvørji ætt, hvørt tungumál
syng takkarsong av hug og sál.
Í Harrans húsi, heimi, høll
syng' takkarsong av huga øll.

**6.** Í Jesu navn' tá andans tala
fær jødar, heidningar at mæla
og koma undir Jesu hond
øll móðurmál um heimsins lond;
tá ljóðar út úr bygd og bý
halleluja um alla tíð.

**7.** Guð faðir vár! Tá verður frøi;
tá ríki títt vil kenna grøði,
sum sólin ferðast vit hvønn dag
í Jesu Kristi dýrdarstað.
Tí, tá eg gav tær hjartað, Guð,
við honum fekk eg himnalut.

***Grundtvig** 1843. **Rólant Lenvig.***

## 2. SÁLMUR

Vit Halgan Anda biðja nú
at gera okkum samd í vón og trú
og at heimsins enda
kirkjuna at verja,
neyð og vandum venda,
sum á vilja herja.
Kyrie eleis!

**2.** Tú lívsins ljós, lýs okkum svá,
at Harrans dýrd vit fáa øll at sjá,
so vit honum fegin
fylgja allar leiðir,
hann, sum okkum vegin
til Guðs ríki greiðir.
Kyrie eleis!

**3.** Tú kærleiks andi, birt í sál
tann kærleikseld, sum halgar verk og mál,
so í Harrans gleði
sameind øll vit standa,
og hans kærleiks megi
signar hug og anda.
Kyrie eleis!

**4.** Guðs andi, lætta sorg og harm,
veit frið, sum barn hann fær við móðurbarm;
um í tungum móði
daprir dagar líða,
uggarin hin góði,
gev tú vón at stríða.
Kyrie eleis!

**5.** Ja, kærleiks andi, ger tað svá,
at vit gudsbarna fund øll koma á;
tá er endað sorgin,
tá er perlan funnin,
opnað himnaborgin,
deyðans máttur vunnin.
Kyrie eleis!

*Týskur sálmur úr 12. øld. **Luther** 1524. **J. Dahl** 1927.*

## 3. SÁLMUR

Mána og sól,
veður og vind
og blómur og børn
skapaði Guð.
Himin og jørð,
alt eigur hann,
Harranum vilja vit takka.
Harri, vit takka tær,
Harri, vit prísa tær.
Harri, vit syngja títt heilaga navn.

**2.** Jesus á fold
livdi sítt lív
og doyði for oss,
livir í dag,
ja, hann er her,
ja, hann er her,
Harranum vilja vit takka.
Harri, vit takka tær,
Harri, vit prísa tær.
Harri, vit syngja títt heilaga navn.

**3.** Andi tín, Guð,
uggari vár,
so livandi er,
ber okkum boð
gjøgnum øll ár
um tína náð.
Harranum vilja vit takka.
Harri, vit takka tær,
Harri, vit prísa tær.
Harri, vit syngja títt heilaga navn.

***Britt G. Hallquist** 1973. **Holger Lissner** 1978.*
***Alexandur Kristiansen.***

## 4. SÁLMUR

Nú skínur sólin bjarta og gyllir fjøll og líð,
hon lívgar blómurnar á foldum vaksa;
nú gleðast baldursbráin og smæran so fríð,
og fuglar úr reiðrunum nú flagsa.

**2.** Og títlingurin lítli nú syngur morgunsong,
til dagsins yrki fer hann nú so lættur,
og tó hann flýgur víða um bygdir og um ong,
hann vitjar til ungar sínar aftur.

**3.** Mítt eyga hevur notið ein tryggan góðan blund,
í Harrans hond so søtt eg havi sovið.
Guðs undurverk eg skoði í hesi morgunstund;
við songi eg Guði mínum lovi.

**4.** Tøkk fyri, at tú hevur, mín kæri, góði Guð,
mær givið evni til títt verk at skoða;
fylg mær og ver tú hjá mær, tá eg nú fari út,
– nú sólin í fjøll og líð man roða.

***Símun av Skarði** 1907.*

## 5. SÁLMUR

Guðs kirkjugrund aleina
er Harrin Jesus Krist.
Her vatn og orðið reina
hans kirkju skaptu vist.
Av himni kom at leita
sær halgu brúður hann,
við blóði frelsu veita,
við deyða lív hann vann.

**2.** Um landamark og tjóða
nú ljóða stevnuróp
úr frælsisbrævi góða:
ein drott, ein' trúgv, ein dóp!
Eitt heilagt navn hon nevnir,
eitt breyð á borði er,
við eini vón hon stevnir,
Guðs kirkja, fram á ferð.

**3.** Um menn við undran skoða
tey sár, hon bera man,
tí klandur tók at loga,
og trúarvilla brann,
tó vaktarmenn enn vaka.
Hvør leingi? spyrja teir.
Brátt einki stríð skal saka,
ei náttarvøkur fleir.

**4.** Um neyð og trongd og tregi
og vápnastríð ber á,
hon bíðar sæl við gleði,
at Jesus koma má.
Tá ævinleikans friður
skal stilla sakn og sár,
og Harrans kirkjusigur
ber ævigt fagnarár.

**5.** Tó, sjálvt á foldardøgum
hon livir í Guðs nánd,
við frelst á himli høgum
hon kennir felagsbond.
O, halgu, sælu vinir!
Guð gev oss náði nú
at vinna fram sum hinir,
hjá tær at festa bú!

***Samuel John Stone** 1866. **Edm. í Garði.***

# GUDSTÆNASTUSKRÁ

**Inngangsspæl:**
GHM & Havnar Hornorkestur
**Vælkoman og bøn**
**1. sálmur:** Nú skínur sól í dýrd og mæti
**Heilsan**
**Kollekt**
**Epistul**
**2. sálmur:** Vit halgan Anda biðja nú
**Søga til børnini**
**3. sálmur:** Mána og sól
**Evangelium**

**Trúarjáttan í felag**
**Kórsvar**
**Prædika**
**Bøn og ápostólska signingin**
**Kórsvar**
**4. sálmur:** Nú skínur sólin bjarta
**Tøkk og kunning**
**Faðirvár**
**Áronitiska signingin**
**5. sálmur:** Guðs kirkjugrund aleina
**Útgangsspæl:** Marsjur

---

**LUTTAKANDI PRESTAR**

Anne Mette Greve Klementsen, Bergur D. Joensen, Sverri Steinhólm, Ann Hermansdóttir, Bergtórur Hjelm Bjarkhamar, Uni Næs, Derhard Jógvansson, Theodor Eli Dam Olsen & Heri Joensen.

**VIT YNSKJA ØLLUM EINA GLEÐILIGA HVÍTUSUNNU**

---

## ÁPOSTÓLSKA TRÚARJÁTTANIN

Vit avnokta Djevulin og allar gerningar hans og allan atburð hans.

Vit trúgva á Gud Faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar.

Og á Jesus Krist, Guds einborna Son, váran Harra, sum er gitin av Heilagum Anda, borin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niður farin til heljar, triðja dagin staðin upp frá deyðum, farin til himmals, sitandi við høgru hond Guds Faðirs, hins alvalda, haðani hann kemur at døma livandi og deyð.

Og á Heilagan Anda, eina heilaga almenna kirkju, samfelag teirra heilagu, fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir.

---

## KÓRSVAR

**Lat verøld ei við síni makt**
oss vika burt frá dópsins pakt,
men gev, vár longsil allur má
til tín, til tín í heilum stá!

**Harra Guð, títt dýra navn og æra**
skal um allan heim í metum vera,
hvør sálin sæla,
hvør tungt má træla,
alt, sum kann mæla,
skal teg umtala og æra.

## KIRKJUKAFFI

Eftir gudstænastuna eru øll hjartaliga vælkomin at fáa ein drekkamunn í Badmintonhøllini.

Til børnini er eisini okkurt.

## TØKK

Kirkjuráðini og prestarnir í Suðurstreymi takka hjartaliga fyri uppmøtingina, stuðulin og møguleikan fyri hesi útigudstænastuni. Harrin vælsigni tykkum!

**Forsíðumynd:** Nýggi messuakulin hjá Vesturkirkjuni. Paulina M. K. Eliasen hevur virkað.

Control P 357774

